## Mentamálaráðið
PRÓVSTOVAN

## Próvtøkufyrisitari

**Starvið**
Í sambandi við at eitt av starvsfólkum okkara er farið í annað starv, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum málsviðgeri leyst at søkja á próvstovuni.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a. at:
- Málsviðgerða
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur á próvstovuni – innstilling til próvtøku, skemalegging, tekstuppgeving o.a.
- Saman við uppgávunevndum o.ø., gera próvtøkuuppgávur klárar til prentingar, skriva tekstir, gera uppseting (lay out) o.a.
- Prenta, pakka og senda próvtøkuuppgávur til allar skúlar í skúlaverkinum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til próvstovuna, t.d. samskifti við próvdómarar o.o.
- Avgreiða samsýning fyri próvdøming

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjari hevur:
- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovuyrkinum ella øðrum, ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv (windows, word, access, excel, power point, indesign og photo shop)
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at arbeiða undir tíðartrýsti

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 3.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið, og allar deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Ella sum teldupost til mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. oktober 2007, kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Bjarna Wilhelm, fyrisitingarleiðara í Mentamálaráðnum, tlf. 35 50 50.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
Í **aðalráðnum** eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin er býtt í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.
**Próvstovan**, sum er í fyrisitingarpartinum av stápinum, hevur til uppgávu at umsita teim praktisku viðurskiftunum próvtøkuni viðvíkjandi, so sum at gera og prenta próvtøkuuppgávur og annars at samskifta við uppgávunevndir, próvdómarar og skúlar.

# Kunningarleiðari til Felagið Vágar

Felagið Vágar er eitt felag sum rekur Vága Kunningarstovu og umboðar ferðavinnuna, handilsvinnuna og aðra vinnu.

**Søkt verður eftir kunningarleiðara, starvið er tíðaravmarkað til 3 ár.**

Leingjan av starvstíð er treytað av framhaldandi fígging.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá Kunningarleiðaranum eru m.a.**
- At kunna um Vágar – Mykines
- At marknaðarføra Vágar og Mykines við faldarum o.ø.
- At menna og samskipa handils- og tænastuvinnuna í økinum.
- At kunna um tiltøk innan mentan í økinum
- At dagføra heimasíðuna hjá felagnum Vágar
- At hava dagligu leiðsluna av felagnum Vágar.
- At hava ábyrgd av fíggjarstýringini.

**Kunningarleiðarin skal kunna:**
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.
- Hava hollan málkunnleika
- Hava teldukunnleika
- Royndir innan ferðavinnu er ein fyrimunur

Nærri fæst at vita við at venda sær til Eyð Ellingsgaard nevndarformann á tlf. 221431.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan 20. oktober. 2007.

**Felagið Vágar**
**Eyð Ellingsgaard**
**380 Sørvágur**

Skulu tygum
# Byggja hús
ella umvæla?

**So ger Sp/f S.H. Smíð alt timbur- og snikkaraarbeiði.**

**Tygum eru vælkomin at fáa eitt óbindandi tilboð.**

Sp/f S.H. Smíð | Oman Hoydalar 27 | FO-188 Hoyvík
tel. 32 12 24 | fartel. 52 12 24 | fax 32 13 24

# Frá Sláturmiðstøðini

**Vit hava yvirtikið arbeiðið hjá AG – Kjøt á Toftum**

Vit eru byrjaðir at fletta, so um tú ikki hevur tíð og orku, so eru vit til reiðar at hjálpa tær, óavmarkað nøgd.

Eisini er møguleiki at bíða, ímeðan flett verður.

Vit kunnu eisini skipa fyri flutningi, um tað er neyðugt.

Skjótt og væl úr hondum greitt.

**Ring: 21 67 47 ella 28 67 87**

**Sláturmiðstøðin**
Fjøruvegur 1 · 785 Haraldssund

# Summarhús
## í Svínoy til sølu

Grundøki er umleið 400 m² matr. 13 við tilhoyrandi hjalli sum er í besta standi

Húsini eru 9x11 alin til støddar og eru totalt renoveraði í 1993, beklødd við Føroyaprofili, bjálvaði og øll vindeyguðu eru skift.

Kjallarahæddin er klødd – øll sum hon er – við timbri, og er innrættað við brúsurúm og vaski.

Miðhæddin er alt eitt rúm við køki og stovu, umframt eina lítila gongd.

Lofthæddin hevur 2 sovirúm gongd og vesi. Pláss er til 10 liggjandi gestir.

Húsini eru øll klødd innan við profilbrettum sum eru hvítbeisaði

Húsini hava sentralvarma og hava eisini ein hugnaligan kolovn.

Húsini liggja úti á uttara Vali í sera hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi.

Húsini verða bert seld um nóg høgt boð verður givið.

**Telefon 456436 / 250436**

# HÚS Á GARÐAVEGNUM

Um hóskandi boð fæst, eru eini hús á Garðavegnum í Klaksvík til sølu.

Húsini eru 96 m² í 2 hæddum.

Húsini eru nýumvæld innan í 2005-2006 við t.d. nýggjum køki, bað og gólvum

**Tlf. 210689**

Sosialurin
www.sosialurin.fo